## Spældu við hjartanum

Serbiski venjarin, Radomir Antic, helt eftir dystin, at føroyska landsliðið veruliga stríddist fyri lívinum. – Eg haldi at tit tykkara spælarar spældu við hjartanum. Teir vildu kanska ikki so nógv frameftir, men teir gjørdu tað trupult hjá okkum. Eisini tí teir vóru somikið dugnaligir at draga ferðina burtur úr dystinum, segði Radomir Antic, sum tó ikki vildi kalla føroyska spælið fyri primitivt.



## 1,15 milliardir fyri Villa

Alt summarið hevur verið tosað um, at Real Madrid hevði ætlanir um at keypa EM-toppskjúttan, Davic Villa, úr Valencia. Boðini úr Valencia hava støðugt verið, at spælarin ikki er til sølu, men nú hevur forsetin í Valencia, Vicente Soriano, boðað frá, hvat spælarin kostar. – Sambært klausulinum í sáttmála hansara, so skal ein møguligur keypari leggja 1,15 milliardir krónur á borðið. So kunnu vit tosa um ein møguligan handil, sigur Soriano.

# Føroyska Maria bar Merkið

**Gentan, sum gekk fremst, tá Merkið varð borið inn á Stadion, var Maria Sivic, sum er fødd í Føroyum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Maria sæst her ganga fremst í myndini við Merkinum hjá føðilandi sínum*

Beograd, Serbia: Hjá Mariu Sivic var talan um heilt serliga hending, tá føroyska fótbóltslandsliðið vitjaði í Beograd.

Hóast hon ikki minnist nakað til Føroyar, so er hetta føðilandið hjá Mariu, sum er dóttirin hjá Tomislav og Miru Sivic, sum vóru seks ár í Føroyum í ávíkavist Vági, Havn og í Klaksvík.

Ætlanin var annars, at eitt úrvalsið við smápiltum skuldi bera Merkið á vøllin. Tomislav Sivic hevði tó spurt seg fyri hjá Serbiska fótbóltssambandinum, har hann hevur starvast um U19-venjari, um tað var møguleiki hjá Mariu at vera við, nú hon var fødd í Føroyum, og hetta var eingin trupulleiki.

Sjálv var Maria eisini ovurfegin um høvið, sum hon soleiðis fekk at umboða sítt føðiland.

- Hon hevur fortalt øllum í flokkinum um hetta, men har vóru fleiri, sum ikki trúðu henni, tá hon segði, at hon var fødd í Føroyum. Hon svaraði teimum tó aftur: »Bíðið tit bara til leygardagin. So fáa tit at síggja!«. So tað er nokk eingin ivi um, hvør verður miðdepilin í skúlanum mánadagin, segði Mira flennandi, tá vit tosaðu við hana leygardagin.

Og var tað kensluborið hjá Tomislav og Miru at síggja fleiri av føroysku vinfólkum sínum, so var løtan ikki minni kensluborin hjá Mariu.

Tárini fingu frítt at fara, tá bussurin við føroysku spælarunum gjørdi seg til reiðar at koyra, men nakrar góðar gávur bøttu tó um hetta. Ikki minst, tá hon fekk troyggjuna við 8-talinum frá Mikkjali Thomassen.

- Hendan troyggjan skal als ikki vaskast, men hangast beint upp á veggin!, vóru boðini til foreldrini, tá bussurin var farin, og vit onnur spákaðu út av stadion.

# Bragd av U21 í Baka

**Gunnar Nielsen bjargaði brotssparki og Leivi Hanssen helt høvdið kalt, tá hann móti dystarenda fekk sama javnleik**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hýrurin í føroysku U21-leguni var í topp, tá teir í gjár fóru undir ferðina úr Baku í Aserbadjan til Athen í Grikkalandi.

2-2 javnleikurin í Baku merkir nevnliga, at føroyska liðið ikki endar á afasta sessinum í bólkinum, og tað var fyrst og fremst hetta, sum var málið.

### Hitin darvaði

Men tað var nú ikki uttan trupulleikar, at føroyska liðið bjargaði sær einum stigi í Baku.

- Hitin var øgiligur í fyrra hálvleiki, men tá sólin fór vesturum eftir steðgin gjørdist tað nógv betri. Og í øðrum hávlleiki vóru vit tað skapandi liðið, sigur Heðin Askham, sum er annar av venjarunum hjá føroyska liðnum.

Azerbaidjan legði seg á odda 1-0 í 20. minutti, men fimm minuttir seinni javnaði Gudmund Nielsen úr B71 til 1-1. Azerbaidjan legði seg aftur á odda 2-1 eftir 32 minuttum. Tá eitt korter restaði bleiv Levi Hanssen hjá EB/Streymi feldur í brotssteiginum, og dómarin var ivaleysur, og dømdi brotsspark til Føroyar. Levi vildi sleppa at skjóta sjálvur, og setti hann bóltin í netið til javnleik 2-2, sum gjørdist endaliga úrslitið.

Stóra føroyska hetjan mundi tó vera Gunnar Nielsen í føroyska málinum. Umframt at trýstið á føroyska málið var stórt, so bjargaði hann eisini einum brotssparki, sum kundi punkterað dystin fyri okkara viðkomandi.

Í yvirtíðini hevði Sølvi Vatnhamar eitt rimmarskot frá 25 metrum, sum azerbaidjanski málverjin á undrunnarveradan hátt fekk júst að upp um trýkantin, annars hevði verið talan um aldarinnar føroyska landsliðsmál, verður sagt.

